## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri, seinnapartin minni vindur av landsynningi. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, um kvøldið lot av ymsum ættum. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin upp í hvassan vind av norði og ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur. sunnudagin minni vindur av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

Kári við Stein úr Grønlandi:

# Framvegis nógvur toskur og krabbi

**Fiskivinnutíðindi úr Grønlandi dag fyri dag**

### 3. august

Í dag er dýrdarveður og + 9 stig. Regina C kom her at landa í morgun. Teir hava 560 tons inni.

Polar Assik er í Nuuk og landar. Har er alt fult hjá teimun. Teir vóru eisini inni og landaðu hósdagin 30. juli fult skip.

### 4. august

Sama veður sum í gjár. Regina C loysti til nýggjan túr í morgun, og teir vóru ikki meir enn leysir, tá kom Akamalik til kei. Teir hava gott 370 tons inni.

### 5. august

Sama veðrið sum í gjár. Akamalik loysti í morgun kl. 6 nýggjan túr, og so kom Qaqqatsiaq inn til kei. Teir hava um 370 tons inni

### 6. August

Í dag kom Polar Qaasiut inn at landa. Teir hava um 370 tons inni.

### 9. august

Nataarnaq kom inn at landa í dag. Teir hava okkurt brek við fabrikkini umborð. Tí komu teir inn dagin fyri ætlaða landing. Krabbabátarnir, sum royna her um leiðir, fáa nógvan krabba. Teir landa krabbarnar livandi og fyri, at teir ikki skulla doyggja í hesum hita, koyra teir ís omaná krabban.

### 10. august

Polar Nagtoralik er inni í Nuuk og landar.

### 11. august

Nataarnaq loysti nýggjan túr í nátt. Ein óføra góður dagur + 20 stig og stilli.

### 12. august

Í dag eru +14 stig. Steffen C og Polar Aassik eru inni í Aasiat og landa. Polar Amaroq er í Nuuk og landa.

### 13. august

Í dag kom Ocean Tiger inn at landa gott og væl 270 tons. Teir fóru longu aftur í kvøld nýggjan túr.



*Hetta er oljuvinnuskipið sum Vesturland er "hundur" fyri*

### 16. august

Lómur kom í dag inn at landa her í Sisimiut. Har var alt fult hjá teimun. Teir hava eisini fiskað væl frammanundan, og hava teir landað í Illulisat.

### 17. august

Polar Aassik kom inn til Aasiat at landa í morgun við fullum skipi. Lómur loysti nýggjan túr seinnapartin

### 19. august

Í dag er toka. Akamalik kom inn at landa í morgun. Teir hava gott 350 tons inni. So kom ein av okkara gomlu kenningum, fyrrverandi rækjutrolarin Vesturland, sum ikki hevur verið her síðani fyrst í 90- unum. Nú eru teir hundur, hjálparskip, fyri Atlantic Eksplorer, sum kannar botn fyri olju. Tað stuttliga hjá mær var, at eg eri gubbi at einum av manningini, Kollur Dan, og hann stóð við endanum í hondini. Gardar, skiparin, spurdi meg um eg kundi fáa onkran at fiska eini 200 pund av toski, sum teir vildu keypa. Eg fekk fatur á einum manni. Hann fekk útvið 400 pund í ein góðan tíma. Har vóru nógvir góðir fiskar imillum. Teir fingu uppí hendurnar allir samlir at kryvja og hanga upp, og eisini til knettir og frikadellur. Vesturland loysti kl 16. Teir koma nokk inn aftur her um ein lítlan mánaða. Um veðrið er til vildar, skulla teir vera her til inn í oktober.

Krabbabáturin Natoralik er í Pamiut og landar krabba. Teir hava 22 tons henda túrin. Har er skiparin og meistarin báðir gøtumenn. Túrin undan hesum høvdu teir 21 tons. Teir hava 400 teinar standandi og draga teir 2-3 ferðir, so inn at landa.

### 20. august

Tað er greytasvart í toku. Polar Qaasiut kom inn at landa í morgun. Teir hava fulla last henda túrin, út við 440 tons . Polar Assik kom inn til Aasiat at landa í morgun fulla last og dekk.

### 23. August

Polar Naatoralik kom inn til Nuuk í morgun at landa.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 16 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 25 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 30 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 30 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 25 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 988 hPa. vestan fyri Hebridurnar fer í landnyrðing og grynnist.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland – ex ódnin Bill – fer í landnyrðing og verðulr væntandi sunnan fyri Hetland hósnáttin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/08 kl. 06[00] – 24/08 06[00]. Hitin í gjár: 11,5°
Minsti hiti máldur í august: +0,4° -
Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 23/08 kl. 06[00] – 24/08 06[00].
Avfallið higartil í august: 97 mm




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

19. august Mánin næstur jørðini
20. august Tendring
27. august Fyrra kvarter
31. august Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25.aug | 11:09 | 23:33 | 10:09 | 22:33 | 10:24 | 22:48 | 00:46 | 13:09 | 01:46 | 14:09 | 09:24 | 21:48 | 08:24 | 20:48 | 11:24 | 23:48 | 00:01 | 12:24 | 10:54 | 23:18 | - | 12:09 |
| 26.aug | 11:58 | - | 10:58 | 23:22 | 11:13 | 23:37 | 01:33 | 13:58 | 02:33 | 14:58 | 10:13 | 22:37 | 09:13 | 21:37 | - | 12:13 | 00:48 | 13:13 | 11:43 | - | 00:33 | 12:58 |
| 27.aug | 00:22 | 13:01 | - | 12:01 | - | 12:16 | 02:22 | 15:01 | 03:22 | 16:01 | 11:16 | 23:55 | 10:16 | 22:55 | 00:37 | 13:16 | 01:37 | 14:16 | 00:07 | 12:46 | 01:22 | 14:01 |
| 28.aug | 01:40 | 14:18 | 00:40 | 13:18 | 00:55 | 13:33 | 03:40 | 16:18 | 04:40 | 17:18 | - | 12:33 | 11:33 | - | 01:55 | 14:33 | 02:55 | 15:33 | 01:25 | 14:03 | 02:40 | 15:18 |
| 29.aug | 02:57 | 15:22 | 01:57 | 14:22 | 02:12 | 14:37 | 04:57 | 17:22 | 05:57 | 18:22 | 01:12 | 13:37 | 00:12 | 12:37 | 03:12 | 15:37 | 04:12 | 16:37 | 02:42 | 15:07 | 03:57 | 16:22 |